

## ALT Í EINUM

*– Tað er nokkso stuttligt, at vit við Summar Festivalinum megna at hava alt í einum, bæði ein báta-, camping- og ein tónleikafestival, sigur Erik Biskopstø, ið gleðir seg at bjóða fólki vælkomnum á 7. Summar Festivalin í røðini.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

tilkomnu, meðan t.d. The Dreams er nakað, sum tey ungu gleða seg til, sigur Erik Biskopstø.

– Vit hava eisini sera nógvar føroyskar bólkar. T.d. er stuttligt, at ungi bólkurin Grandma´s Basement sleppur at hita upp fyri Westlife. Nógvir av teimum annars sera ymisku føroysku bólkunum eru eisini fløguaktuellir, fegnast Erik Biskopstø um.

### Mennandi strongd

– Hetta er endaspurturin, og fyrireikingarnar eru í hæddini. Telefonin ringir non-stop. Hetta er kanska tað, ið sálarfrøðingar kalla stutt-tíðar strongd, sum er mennandi, sigur ein væl upplagdur Erik Biskopstø læandi, meðan hann leggur afturat, at ein skal óivað vera gjørdur úr serligum tilfari, fyri at tíma hetta ár eftir ár.

– Men at fólk eru glað fyri tiltakið er gevandi. Fólk fegnast, bæði fólk í Klaksvík, og tey vitjandi. Og so er hetta eisini eitt slag av endaspurti av summarfrítíðini, sigur Erik Biskopstø.

Um talið av vitjandi á einum vanligum Summar Festivali sigur Erik, at tað er eitt sindur torført at siga neyvt, tí har eru børn, hjálparfólk og onnur við. Men hann metir, at tá mest hevur verið á festivaløkinum, hevur talið táttað í 8000 fólk. Og tað sær út til, at talið verður høgt í ár eisini, tí forsølan hevur gingið væl, og áhugin er stórur.

### Veðrið

Spurdur, um teir sum fyrireikarar ikki skeita eitt sindur í veðurkort og forsøgnir, sigur Erik Biskopstø, at ein kann velja at hava eitt tiltak eitt ávíst vikuskifti, ella lata vera við at fyrireika nakað. Men hinvegin, so viðgongur hann, at eitt sindur hevur verið hugt eftir forsøgnum. Men av royndum vita fyrireikararnir, hvat kann henda, so alt er væl fest, og trygdin er í hásæti og trygdarætlanin er long og væl gingin ígjøgnum.

**» Hetta er endaspurturin, og fyrireikingarnar eru í hæddini. Telefonin ringir non-stop. Hetta er kanska tað, ið sálarfrøðingar kalla stutt-tíðar strongd, sum er mennandi**

– Tað sær sum heild gott út, og vit vóna tað besta. Og at fólk eru so jalig ger, at ein orkar at halda á at fyrireika, sigur Erik Biskopstø, ið gleðir seg til 7. Summar Festivalin í røðini, og at kunna bjóða fólki á Summar Festival 2010.

*dagfinn@sosialurin.fo*